# Týr hevði óføra ferð í Noregi

**Báðar framførslurnar hjá føroyska bólkinum eydnaðust væl, og áhoyrararnir høvdu stóran áhuga í at keypa teir føroysku sangirnar hjá Týr**



TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Týr spældi í farnu viku til tvey tiltøk í norska høvuðsstaðnum, og báðar framførslurnar riggaðu væl. Tónleikararnir í bólkinum lata sera væl at ferðina, og ætlanin er at fara aftur til Noregs í komandi ár, tá Týr væntandi kemur við nýggjari útgávu.

Fyrra framførslan var í Smuget hóskvøldið, og hóast bæði diskotek, ein onnur konsert og matstova er í bygninginum, kláraði Týr at savna nógv fólk í salinum, har teir spældu. Nógv fólk hoyrdu sjálvsagt Týr fyri fyrstu ferð, men tey lótu væl at.

Seinnapartin fríggjadagin spældi Týr í Norli tjaldinum í Universitetsgaten, og millum rithøvundar og bókaummæli, var Týr einasta tónleikaliga innslagið í hesum tiltakið. Vanligt er, at klassiskur tónleikur er á skránni til slík tiltøk, men hesaferð høvdu fyrireikararnir sent boð eftir føroyskum kvæðarocki.

Hóast vandi var fyri, at oyruni á teimum bókaáhugaðu ikki fór at tola rocktónleikin, so eydnaðist framførslan væl. Tey, sum vóru til bókatiltakið, vóru sitandi, og onnur fólk leitaðu sær innar at hoyra Týr. Fyrireikararnir vóru stak væl nøgdir við Týr.

### Áhugi fyri føroyskum sangum

Týr seldi nógvar fløgur til tiltøkini, og fólk vóru serliga áhugað í at keypa teir føroysku sangirnar hjá bólkinum – Ormin Langa, Stýrisvølin, Ólav Riddararós og Regin Smið.

Fjølmiðlarnir sýndu eisini føroyska bólkinum áhuga. Tíðarritið Scream var á konsertini í Smuget, og fer í komandi útgávu at skriva um framførsluna. Metal Express gjørdi interview við Hera Joensen, gittarspælara, og tað kann lesast á adressuni: http://
www.metalexpress.no

Tónleikararnir í Týr eru sera væl nøgdir við ferðina, og ætlanin er at gera sær dælt av teimum nýggju sambondunum, teir hava fingið við fólk í norsku tónleikavinnuni.

Hetta var fyrsta rættiliga styrkisroyndin hjá Allani Streymoy, sum er nýggjur sangari í bólkinum, og hann kom væl frá báðum framførslunum.

# Spennandi spurnakanning um almanna- og heilsuverkið

SPURNARKANNING
*Tíðindaskriv*

Í hesum døgum eru stovnar kring alt landið í ferð við at svara spurnabløðum frá Trivnaðar- og heilsuráðnum. Hetta er fyrstu ferð ein slík umfatandi spurnakanning um føroyska almanna- og heilsuverkið verður framd.

Úrslitini skulu leggjast fram á stórari trivnaðar- og heilsuráðstevnu, sum verður í Norðurlandahúsinum 14. og 15. november 2002.

### Hvussu er støðan?

Trivnaðar- og heilsuráðið er sett at greina almanna- og heilsuverkið. Og síðani skal ráðið gera eitt uppskot til hvussu føroyska vælferðartænastan skal síggja út í framtíðini.

At røkka hesum umfatandi arbeiðssetningi, skipar ráðið fyri tveimum spurnakanningum, umframt at skipa fyri ráðstevnuni.

Endamálið við spurnabløðunum er at lata brúkararnar, og tey sum gjøgnum starv sítt veita vælferðartænastur, sleppa til orðana. Svarini skulu geva Trivnaðar- og heilsuráðnum eitt so gott støði sum gjørligt at lýsa verðandi støðu á føroyska trvinaðar- og heilsuøkinum.

Einir 60 almennir-, sjálvsognar og privatir stovnar og feløg hava fingið spurnabløð.

– Vit byggja okkara arbeiði á royndirnar hjá brúkarunum og teimum sum starvast innan almanna- og heilsuverkið. At tey svara svara spurnablaðnum, hevur tí avgerðandi tíðning fyri endaliga úrslitið av okkara arbeiði.

– Tað hevði tí verið frálíkt, um teir stovnarn, sum enn ikki hava havt stundir at svara, gera tað skjótt, so úrslitini, ið leggjast skulu fram á trivnaðar- og heilsuráðstevnuni í november, eru so fullfíggjað sum gjørligt, sigur Mia Pedersen, formaður í ráðnum.

### Umfatandi kanning

Í spurnakanningini spyr ráðið millum annað, um starvsfólkið á stovnunum metur samsvar vera millum uppgávurnar tey skulu loysa og tær játtanir og karmar stovnurin hevur. Hvørjar broytingar ynskja tey? Hvat riggar væl? Nær føla tey at kreftirnar ikki røkka? Fær brúkarin nøktandi tilboð? Finnast tilboð til avvarðandi? Eru lógir sum skulu broytast? Og mangt annað.

Teir nógvu spurningarnir skulu geva eina mynd av veikum, sterkum og væntandi liðum í føroyska almanna- og heilsuverkinum. Hvat skal varðveitast, hvat skal broytast og á hvørjum økjum skal nýhugsan fremjast.

### Sig tína meining

Ráðið vil eisini hava samskifti við brúkaran – tað vil siga flestøll okkara.

Til ber at siga sína hugsan, ella koma við hugskotum við at leita sær inn á heimasíðuna hjá ráðnum www.thr.fo ella senda teldupost thr@thr.fo.

Í næstum verða 1000 spurnabløð send brúkarum, sum annar liður í umfatandi spurnakanningini, sigur Trivnaðar- og Heilsumálaráðið í tíðindaskrivi.

# Samkynd og framtíðar lóggáva Føroya

**Svein Askildsen**
*Á Polatrøð*
*410 Kollafjørður*

Tað hevur í longri tíð staðist mikið orðaskifti av ætlanum Høgna Hoydals og Tjóðveldisflokksins um at fáa lóg um skrásett paralag fyri samkynd setta í gildi í Føroyum. Tað tykir mær margháttligt, at Høgni Hoydal sum tjóveldismaður skal vera so mentunnarfremmandur í Føroyum, at hann nú ger Tjóðveldisflokkin til fremsta talsmann teirra samkyndu.

Um tjóðveldisflokkurin ætlar at gera Føroyar til eina miniaturu av Danmark við donskum »frælslyntum« lógum, sum binda fólk á hond og fót, og avspora náttúrligan livihátt og lívsmynstur, so hevur tjóðveldisflokkurin einki at bjóða einum frælsum Føroyum.

»Við lóg skal land byggjast« verður sagt, og satt er tað. Men um lógir, sum eru ímóti náttúruni, verða settar í gildi, byggja vit ikki land. So bróta vit niður!

Eg fari at loyva mær at staðfesta 3 ting:

- Samkynd eru ikki burðardygg.
- Samkynd bróta niður burðardygga menning.
- Samkynd eru ímóti náttúruni.

Náttúran viðurkennir ikki samkynd sum burðardygg, tí kann einki náttúrligt menniskja, við náttúrligum viti og skili, viðurkenna samkynt paralag sum javnsett við t.d. hjúnalag við at skráseta tey sum eina familjueind. Tað eru tveir ella tvær og kunnu aldri við náttúrunnar hjálp gerast fleiri enn teir báðir ella tær báðar. Hvørki avsporaðar lógir ella avsporaðar trúarrørslur kunnu broyta tað.

At snakka um mannarættindi er heilt burturvið. Ídag hevur ein og hvør í Føroyum loyvið til at hava eina meining – eisini tey samkyndu. Men hvat síggja vit í kjalarvørrinum av lóggávuni um skásett paralag rundan um okkum? Jú, um tú vágar tær alment at siga, at ónáttúrligt samlív er synd ella bara burturvið, verður tú revsaður eftir revsilógini og settur fastur. Í londum sum hava breggjað sær av talu-, skrivi- og trúarfrælsi verður alt blakað fyri borð, tí eingin alment má meina, at tey samkyndu hava brúk fyri hjálp. Tú hevur loyvið til at meina at bíblian fer skeiv, men tú hevur ikki loyvi til at meina at bíblian hevur rætt. Diskriminerandi???

Vandin við ónáttúrligum fyribrigdum er júst tann, at nøkur vilja lata tað so pent í, sum vit eru vitni til í hesum døgum. Tað skal legaliserast, so eingin longur skal fáa loyvi at halda fast við og læra tað náttúrliga og revsa tað ónáttúrliga. Í øllum vanligum førum t.d. í plantu- og djóralívi royna skilagóð menniskju at bøta um brek og lúka ónáttúrlig fyribrygdir út. Vit kunnu ikki og skulu ikki lúka menniskju út – samkynd ella ikki. Men við samkyndum er tað so, at tey hava brúk fyri hjálp, tí tey megna ikki ella vilja ikki liva eftir náttúrliga kynsmynstrinum. Og tað kunnu vit bert bøta uppá, um vit áhaldandi og framhaldandi halda okkum til og lesa náttúruna av, sum sigur, at samkynd kunnu ikki nørast náttúrliga. Tí skulu vit heldur ikki við lóg framala samkynd við at javnstilla tað náttúrliga við tað ónáttúrliga.

Óansæð um danir, norðmenn, sviar, íslendarar ella hvør tað so enn er, smíða lógir til frama fyri samkynd, so broytist náttúrulógin aldri. Men kanska tey samkyndu seta eina ella aðra falska vón til útviklingslæruna (evolutiónsteoriina). Tað skal ikki undra meg at tað verður tað næsta hjá hesari desperatu religión, sum serliga lívfrøðilærarar hava gjørt seg til talsmenn fyri – enntá í fólkaskúlanum. Ein vísindagrein, sum ikki kann peika á eitt einasta haldgott prógv fyri sínum pástandum, kann ikki sigast at vera annað enn ein vánalig religión. Hendan læra fór í 19. øld sum brandur um allan heim, og fekk í 20. øld stóran stuðul frá vísindini, serliga tí at vísindin sá sær ein møguleika at sleppa av við Gud. Nú stendur útviklingslæran næstan við gravarbakkan tí seriøsir granskarar skammast við at viðurkenna hana sum eina vísindagrein tí »prógv« aftaná »prógv« einki hald hevði í veruleikanum og harvið heldur ikki í vísindini. Fleiri og fleiri ikki-kristin vísindafólk viðurkenna seg nú eisini sum trúgvandi á ein skapara um enn tey ikki trúgva, at hann skal hava nakran áhuga í okkum sum menniskju. Útviklingslæran er sikkurt eisini tann einasta religiónin, sum kann geva tí ónáttúrliga vón um at gerast náttúrligt á ónáttúrligan hátt. Men um so allur heimurin boyggir seg fyri samkyndum paralagi í dag, so fara eftirkomararnir um 100-200 ár at síggja í eyguni, at vit fóru so syndarliga skeiv. Vónandi vera Føroya eftirkomarar ikki partur av hesi vanlagnu.

Eg sat í einum flúgvara og læs greinina hjá Boga Davidsen við yvirskriftini »Ikki syndari hóast samkyndur«. So segði síðumaðurin: »Eg haldi ein átti at skriva eina grein undir heitinum »Ikki samkyndur hóast syndari«.« Bíblian og Jesus geva eisini vón fyri samkynd. Sanna vón, ja, vón fyri øll menniskju. Øll, sum fata at tey eru vilst. Og tað vóru vit øll. Tað er bert ein vegur innaftur á beint, og tað er Jesus. Hann hevur rindað fyri allar syndir og øll brek. Jesus kann fullkomiliga frelsa, endurreisa, grøða og uppafturrætta ein og hvønn, sum viðurkennir Hann sum einasta og fullkomna offur fyri okkara syndir, misgerðir, veikleikar og sjúkur. Og so mong, sum taka ímóti Honum, teimum gevur Hann mátt til at vera Guds børn.

Tí mugu vit ikki vera slíkir dárar, at vit sum land og fólk fara at góðkenna og viðurkenna og lóggeva ímóti náttúruni. Fyri tað um »eingin er heima« í hinum Norðurlondunum, skulu vit so bara siga »Ø« og vera líka tóm sum tey? NEI. Latið okkum nú vísa okkum sum eitt skilagott fólk. Tað skal vera mín áheitan til allar flokkar á tingi.

Tað er eingin framtíð í samkyndum. Men latið okkum hóast tað vera góð við tey og royna at hjálpa teimum á beint. Sum tað stendur skrivað: »So skulu vit tá ikki longur vera børn og lata okkum kasta og reka higar og hagar av hvørjum lærdómsvindi, tøld av snildum menniskjum við svikabrøgdum villunnar. Nei, sannleikanum trúgv í kærleika skulu vit á allan hátt vaksa upp til Hansara, sum er høvdið, Kristus.« Efesusbrævið 4:14-15.




## FØROYA PRO VITA

**Leygardagin 26. okt.** hevur **„Føroya Pro Vita“** sín árliga evnisdag. Hesaferð eru fýra evni á skránni.

**Kl. 10.10 „Lívið, heppin tilvild“.** Lívið sæð í ljósinum frá einum biologiskum sjónarhorni og einari kristnari lívsáskoðam.

**Kl. 13.00 „Tá ið fyribyrging hevur við sær dráp“.** Viðgerð av viðkomandi fyribyrgingarháttum og hvussu teir í veruleikanum fyribyrgja.

**Kl. 14.30 „Royndir sæð í ljósinum frá norskum fisturtøkuvirksemi“.**

**Kl. 15.30 „Náttúrlig familjuplanlegging“.** Hesin seinasti fyrilesturin er bert ætlaður kvinnum.

Fyrilestrarnir fer norski læknin **Inger Lund Thosen** at halda. Inger hevur gjørt seg galdandi í kjakinum um fosturtøku í Norra. Hon kemur higar saman við manninum Arna.

Evnisdagarnir verða hildnir í matarhøllini á Føroya Læraraskúla.

Fyrilesararnir eru almennir.

**F/ nevndina í „Føroya Pro Vita“**
Ólavur í Mittúni, form.

## SKIPASMIÐJAN



**Nordhavn Generator Eindir**
-við VALMET SISU ella SCANIA motori
-vælegnað sum ljósmotorur á skipi og til neyðstreymsverk á landi

P/F Tórshavnar Skipasmiðja
Tel: 31 11 55 · Fax: 31 11 25

P/F Skipasmiðjan á Skála
Tel: 44 11 55 · Fax: 44 11 25

24 tíma Vakt
tlf: 21 11 55

www.faroeyard.fo · E-mail: sale@faroeyard.fo

## SAMFELAGSSTEVNA Í EBENEZER

Samfelagsstevna verður, um Gud vil, frá mikudegi 6. til og við sunnudegi 10. november.

Møtini fríggjakvøldið, leygardagin og sunnudagin verða hildin í Ítróttarhøllini á Hálsi.

Greinligari kunngerðir koma senni,

Ein og hvør er hjartaliga vælkomin til hesi møti.

**Samkoman í Ebenezer**

Sosialurin
Sosialurin

## Kunngerð um ognartøku í Hvalvík

Í samband við innangarðsútskiftingina í Hvalvík hevur bygdaráðið á fundi 14.10.2002 samtykt at ognartaka ávís lendi eftir §22 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939.

Ognartøkan er víst á kortskjali nr. 16 við broytingum og er burtur av hesum matr. nr.:
44, 46a, 47, 48, 49, 52a, 55, 56a, 57, 59a, 62, 64a, 66, 72, 78, 80a, 113a, 142, 146, 148, 151, 152, 153. 154, 167, 168, 169, 170, 171, 172, 173, 174, 175, 176a, 176b, 179, 195 og 214.

Kortið, og listi yvir, hvussu nógv verður tikið av hvørjum matr. nr., liggur frammi hjá Hvalvíkar kommunu frá 19.10.2002, til kærufreistin er úti 18.01.2003.

Kærast kann um ognartøkuna til Landsstýrið. Møguligar kærur skulu vera skrivligar og sendast Hvalvíkar kommunu.

Viðvíkjandi meting og endurgjaldi verða reglurnar í §4 í lóg nr. 69 frá 7. mai 1881 nýttar.

**Hvalvíkar kommuna**

## Goymsluhøli

Vit sóknast eftir goymsluhøli í Havn, sum er uml. 150 m2 til støddar. Vinarliga setið tykkum í samband við okkum.

**Føroya Fiskasøla**
Postsmoga 68
110 Tórshavn
Att.: Guðrun Olsen

**Tlf. 345 345**

## Søkt verður eftir lærlingi til eykalutagoymsluna

FHS-prógv er ein fyrimunur. Hevur hetta tín áhuga, send eina skrivliga umsókn til:

**Bilasølan**
v/ Øssur Johannesen
postboks 3192
110 Tórshavn
Tlf. 315354

Audi

## Plátusmiður

P/F Wenzel søkir eftir dugnaligum plátusmiðji til plátuverkstað okkara at byrja skjótast gjørligt. Viðkomandi hevur møguleika at leiga sær eina íbúð við úýni yvir alla havnina frá okkum.

**P/F Wenzel**
Akranesgøta 5 · 100 Tórshavn
Tlf. 354500
Att.: Antonius Dalsgaard



Taljur
Stroppar
Trýst-slangur
Spuli-slangur

**Tórshavnar Maskinhandil**
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29 - 30
100 Tórshavn - Tlf. 313442

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin -tað loysir seg